*Í kjalarvørrinum á altjóða oljufeløgunum:*

# Schlumberger fyrireikar seg til føroyska oljuævintýrið

*-Vit vilja vera í góðari tíð og fyrireika okkum, soleiðis at oljufeløgini, tá tíðin er búgvin til tess, kunnu síggja, at vit hava gjørt okkara heimaarbeiði væl og virðiliga síga umboð fyri heimsins størstu ídnaðarfyritøku, sum hava vitjað í Føroyum.*



*Eitt av skipunum hjá Geco Prakla, sum møguliga verður at síggja í føroyskum sjógvi í næstu ár*

JAN MÜLLER

Heimsins størsta fyritøka í oljuídnaðinum, Schlumberger, er nú eisini komin til Føroya. Ikki færri enn 8 umboð fyri hesa risastóru multinationalu fyritøku, ið veitir allar hugsandi tænastur til oljufeløg o.o., sum arbeiða í oljuvinnuni, vóru í Føroyum nú um dagarnar fyri at kunna seg við viðurskiftini her.

Talan er um oddafólk í flestu av undirdeildunum í Schlumberger, ið fevna um alt frá seismikki til oljuboring. Hetta er tann parturin av Sclumberger, ið gongur undir heitinum „Oilfield Services".

Sclumberger er risastór fyritøka við meira enn 50.000 starvsfólkum. Umsetningurin liggur um 75 milliardir krónur.

Vitjanin í Føroyum av umboðunum fyri Schlumberger er fyritøkuna er helst enn eitt týðuligt tekin um, at altjóða oljuvinna hevur stórar vónir og somuleiðis tiltrúgv um Føroyar sum framtíðar oljuland.

**Stinga út í kortið**

David Crowley er marknaðarstjóri í Sedco Forex, sum er ein av mongu greinunum í Schlumberger-familjuni. Hann var við í Føroyum og sigur við Tíðindablaðið Sosialin, at umboð fyri tær ymsu deildirnar í Schlumberg møttust á fundi í Aberdeen í mars í ár við tí eina fyri eygað — at umrøða nýggja oljulandslutin á Atlantsmótinum.

-Vit vóru saman fyri at umrøða tøkniligu avbjóðingarnar, sum oljuleiting og -framleiðsla á djúpum vatni á Atlantsmótinum hevur við sær. Og her eru Føroyar ein týðandi partur. Vit gjørdu av at fara til Føroya fyri at síggja landið, tosa við umboð fyri myndugleikar, vinnulív o.o., til tess at vita, hvussu stendur til við fyrsta útbjóðingarumfarinum, hvussu tíðarætlanin er, nær borpallar skulu vera tøkir o.t.

Gordon Ballard er marknaðarstjóri í einum øðrum Schlumbergerfelag, „Wireline & Testing". Hann er fegin um vitjanina í Føroyum.

-Vit hava arbeitt í oljuvinnuni kring allan heim seinastu 60 árini, og vit ætla okkum eisini at vera við, tá føroyska oljuvirksemið byrjar. Vit vilja vera væl fyrireikaðir til hetta, og tí eru vit komnir til Føroya longu nú.

Bengt Larssen, starvast sum jarðfrøðingur á Geco Prakla, sum er tann deildin í Schlumberger, sum tekur sær av seismisku kanningunum.

-Vit eru komnir higar fyri at fyrireika okkum uppá ein útvikling, sum vit trúgva verður her, og sum vit fyri so vítt longu eru uppi í. Endamálið við hesi vitjanini er at læra landið og fólkið at kenna, at síggja, hvussu ídnaðurin er fyri, og út frá hesum at siga tykkum, hvat vit hava tørv á og annars, hvat vit halda um ein komandi oljuútvikling.

Geco Prakla er helst tann deildin í Schlumberger, sum hevur havt mest við Føroyar at gera. Felagið hevur skotið seismikk við Geco My fyri AMG-samtakið og fyrireikar í løtuni eina rættiliga umfevnandi verkætlan fyri Føroyaøkið í 97. Her er bæði talan um at gera kanningar fyri oljufeløg og eisini at gera kanningar fyri egna rokning.

Annars var eitt av hinum feløgunum í Schlumberger-familjuni, Dowell, við til uppgávur í Lopra fyri Danop.

**Arbeiða fyri oljufeløg**

Umboðini fyri Schlumberger gera greitt, at fyritøkan er bert ein tænastuveitandi fyritøka í oljuídnaðinum, og hevur tí einki við eina lisensrundu at gera eins og oljufeløgini.

-Vit veita oljufeløgunum kring allan heimin nøgvar ymiskar tænastur og vænta eisini at gera tað í Føroyum, sigur David Crowley, sum hervið bjóðar oljufeløgunum tænasturnar hjá Schlumberger konsernini.

Hann vísir á, at teir hava avgjørt at vera virknir nú beinanvegin, heldur enn at byrja um nøkur ár, og tá finna út av, hvat verður av veitingum og arbeiði.

-Tað er tí, at vit nú eru komnir til Føroya at leggja eina ætlan, kanska longu 2-3 ár, áðrenn nakað fer í gongd av álvara. Hetta skal so gera okkum betri kappingarførar. Tá kundar okkara, sum í høvuðsheitum eru oljufeløgini, síggja, at vit hava gjørt okkara heimaarbeiði í góðari tíð, fara teir vónandi eisini at brúka okkum.

**Vilja hava samarbeiði við føroyingar**

Gordon Ballard frá Wireline & Testing sigur, at týðandi parturin av heimaarbeiði teirra er at kunna seg við Føroyar og fólkið her.

-Vit hava í hyggju at gera eina neyva ætlan fyri virksemi okkara í Føroyum í framtíðini, og til tess er neyðugt at kenna landið og umstøðurnar her. Vit vilja fegnir hava samvinnu við føroyingar, og tað merkir eisini, at vit vilja læra upp føroyingar, taka teir í ar

*Framhald á síðu 12*



*Partur av Schlumberger-monnunum, sum ... farið varð ... við tyrluni hjá Atlantic Airways. Bengt Larssen uttast til vinstru, David Crowley nr. 4 fr. v., Gordon Ballard nr. 6 fr. v. og uttast til høgru Graham Stewart, ið ... føroyingur, sum starvast hjá stórari oljuráðgevarafyritøku í Skotlandi. Hann var ferðaleiðari hjá Schlumbergerfólkunum saman við Paula Einarsson frá Føroya Oljuídnaði. Mynd Jens Kr. Vang*

